# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

**Tórshavn**, 24. januar 2018

**J.Nr.:** 18/00035-1

**Viðgjørt:** JEK

**Løgtingsmál nr. XX/2017: Uppskot til løgtingslóg um landskassatrygd fyri Oyggjaleikir í Føroyum**

**Uppskot til**
**Løgtingslóg**
**um**
**landskassatrygd fyri Oyggjaleikir í Føroyum**

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at veita fíggjarliga trygd fyri, at Oyggjaleikirnir kunnu verða í Føroyum í seinasta lagi í 2029.
*Stk. 2.* Trygdin í stk. 1 kann ikki fara uppum í alt 10 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31.desember árið eftir, at Oyggjaleikirnir hava verið í Føroyum, tó í seinasta lagi 31. desember 2030.

Tinganes • Postsmoga 2039 • FO-110 Tórshavn
Telefon: + 298 35 22 00 • Telefax: + 298 35 22 01 • E-mail: FMR@FMR.FO

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Føroyar ynskja at bjóða seg fram, at halda Oyggjaleikirnar í Føroyum í seinasta lagi í 2029.

Skal hetta lata seg gera krevst, at vísast kann á fíggjarliga trygd, saman við fráboðan til International Island Games Association um, at Føroyar ynskja at gerast vertur fyri Oyggjaleikunum. Tí leggur landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hetta lógaruppskot fyri Løgtingið.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva ásetir í § 42 í løgtingslóg um Stýrisskipan Føroya, at lán ella borgan o.a.m., ið skuldbindur løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki kann verða tikið ella veitt uttan við heimild í løgtingslóg.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja, at Føroya kunnu bjóða seg fram at vera vertur fyri Oyggjaleikunum, tá ið høvi býðst, tó í seinasta lagi í 2029.

Grein 21 í International Island Games Association ásetir, at limalond í seinasta lagi 7 ár undan Leikunum skulu gera vart við seg, um Oyggin/ Oyggjarnar ynskja at hýsa Leikunum.

Limalanda Felagsskapurin (her ÍSF) skal í minsta lagi 3 mánaðir áðrenn aðalfundin boða International Islands Games Association rá, at Føroyar ynskja at hýsa Oyggjaleikunum.

Saman við fráboðanini skal verða hjálagt:

- skriv frá landsstýrinum, sum váttar sín fíggjarliga stuðul
- ein ávegis lista yvir ítróttargreinar saman við váttan um, at nøktandi hentleikar eru ella fara at verða tøkir
- eitt yvirlit yvir gistingarmøguleikar

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Samanumtikið er ætlanin við uppskotinum, at tryggja, at Føroyar kunnu bjóða seg fram at hýsa Oyggjaleikum innan ella í seinasta lagi í 2029.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Ítróttarsambandi Føroyar (ÍSF) og alment til hoyringar á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið uttan so, at trygdin gerst effektiv. Um Føroyar fáa møguleikan at gerast vertir fyri Oyggjaleikunum, og trygdin verður brúkt, er talan um eina útreiðslu upp til í mesta lagi 10 mió. kr. fyri landið.

Samstundis er greitt, at verða Oyggjaleikir í Føroyum merkir hetta væntandi, at 2-3.000 ítróttarfólk, venjarar og hjálparfólk o.o. koma til Føroya. Hetta vil skapa stórt avleitt virksemi fyri flutningsfyritøkur, hotell-, gistingar- og matstovuvirksemi, handilsvinnuna v.m. Hetta gevur aftur avleiddar skatta- og avgjaldsinntøkur til land og kommunur.

Hartil kemur eitt stórt marknaðarføringsvirði fyri Føroyar sum land av tílíkum átaki.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri landið og kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna. Men í tann mun, at hetta lógaruppskotið kann viðvirka til, at Oyggjaleikir vera í Føroyum, vil hetta fáa jaliga ávirkan á vinnuna. Tí Oyggjaleikir vilja skapa stórt avleitt virksemi fyri flutningsfyritøkur, hotell-, gistingar- og matstovuvirksemi, handilsvinnuna v.m. Hartil hevur hetta týdning fyri marknaðarføring av Føroyum, eitt nú sum ferðaland.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar ella sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, men hevur jaligar avleiðingar fyri Ítróttarsamband Føroya, sum við fíggjarligu trygdini fær møguleika at senda fráboðan til IIGA um, at Føroyar ynskja at gerast vertur fyri Oyggjaleikunum.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.9. Marknaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið heimilar landsstýrismannin at veita fíggjarliga trygd fyri, at Føroyar kunnu hýsa Oyggjaleikunum, tó í seinasta lagi í 2029.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greina

**Til § 1**
Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at veita fíggjarliga trygd fyri, at Oyggjaleikirnir kunnu verða í Føroyum, tó í seinasta lagi í 2029. Trygdin kann ikki fara uppum í alt 10 mió. kr.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu og sólsetursáseting.

Fíggjarmálaráðið, 24. januar 2017

**Kristina Háfoss**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason